Álit

í

løgtingsmáli nr. 72/2020: Uppskot til løgtingslóg um at endurnýggja strandfaraflotan

Bjørt Samuelsen, Kristina Háfoss, Høgni Hoydal, Sirið Stenberg, Beinta Løwe Jacobsen og Hervør Pálsdóttir, løgtingsmenn, hava vegna Tjóðveldi lagt málið fram 19. januar 2021 og eftir 1. viðgerð 26. januar 2021, er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 4., 11. og 18. februar og 8. og 9. mars 2021.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við MEST, Klaksvíkar Sleipistøð, KJ Hydraulik, Thormund Johannesen, skipsverkfrøðing, og landsstýrismannin í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen, saman við Strandfaraskipum Landsins.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Magnus Rasmussen, Jákup Mikkelsen, Bill Justinussen og Kristin Michelsen) hevur hesar viðmerkingar:

Føroyar eru eitt oyggjaland og tí hevur verið og er enn tørvur á at hava góðar og tryggar farleiðir ímillum oyggjarnar. Seinastu nógvu árini eru oyggjarnar samanbundnar við byrgingum, brúm og tunlum, men enn eru nakrar oyggjar, sum hava brúk fyri góðum og tryggum sjóvegis farleiðum. Strandfaraskip Landsins hevur í nógv ár røkt hesa uppgávu, og ger tað enn tann dag í dag.

Flestu av skipunum, sum í dag røkja sjóvegis farleiðirnar millum oyggjarnar, eru gomul skip og ikki so sjáldan tørva teimum ábøtur ella umvælingar. Tí kann tað undra, at eingin ætlan er løgd fyri eini endurnýggjan av strandfaraflotanum fyri fleiri árum síðani, men vit kunnu bara staðfesta, at so er ikki. Tí er tað nú alneyðugt at leggja eina greiða ætlan fyri endurnýggjan av strandfaraflotanum, tí vit eiga sum samfelag at gera okkara besta fyri, at øll øki í landinum, sum tørva sjóvegis samband, altíð hava eitt trygt og gott samband.

Uppskotið hjá Tjóðveldi leggur upp til, at vit longu í ár skulu byrja hesa endurnýggjan av strandfaraflotanum við at gera eina eykajáttan upp á 30 mió. kr. í ár og síðan seta 60 mió. kr. av á fíggjarlógini næstu fimm árini. Samgongan tekur hesa avbjóðing við strandfaraflotanum í stórum álvara. Hetta sæst m.a. í langtíðarløguætlanini, har samgongan setir pening av til at endurnýggja strandfaraflotan árini 2025, 2026 og 2027, íalt 200 mió. kr.

Landsstýrismaðurin upplýsti nevndini, at hann heilt skjótt fer at seta eina nevnd, sum m.a. skal lýsa virksemið hjá Strandferðsluni í dag og eisini at lýsa fleiri ymiskar møguleikar, hvussu Strandferðslan kann skipast í framtíðini. Tá nevndin er liðug við arbeiðið og frágreiðing er skrivað, so verður málið tikið upp til politiska viðgerð og støðutakan.

Meirilutin heldur, at skilagott er at bíða eftir úrslitinum av arbeiðinum, sum landsstýrismaðurin nú setir í verk fyrsta dagin og hareftir tí politisku viðgerðini og støðutakanini.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Aksel V. Johannesen, Páll á Reynatúgvu og Ruth Vang) vísir á, at støðan við verandi ferjuloysnum er ótolandi á summum av leiðunum til smærru oyggjarnar.

Torført er við verandi ferjum at rokna við støðugum ferðasambandi til smærru oyggjarnar, og ávirkar hetta í stóran mun trivnaðin og møguleikan at røkja starv og vinnu á hesum plássum.

Uppaftur verri gerst støðan, tá ferjan verður tikin úr sigling onkustaðni fyri at verða sett í sigling aðrastaðni. Eitt nú í sambandi við viðlíkahald, og har onki egnað avloysaraskip er.

Samgongan skal ikki einsamøll lastast fyri íkomnu støðuna, tí undanfarin landsstýri hava ikki raðfest hesa uppgávu nóg væl.

Samgongan er kortini sek í ikki at raðfesta hesa endurnýggjan av flotanum til smærru oyggjarnar frameftir.

Um samgongan gjørdi eina breiða og varandi semju um hesa íløguætlan saman við andstøðuni, so kundi hald verið í ætlanini, men einsæris at vísa til eina íløguætlan, sum liggur uttanfyri stjórnartíðarskeiðið hjá hesi samgonguni, er at kasta útoyggjunum torvmold í eyguni. Álitisvekjandi er tað ikki, men kann møguliga brúkast sum valagn.

Minnilutin er sannførdur um, at einasta rætta loysnin fyri útoyggjarnar er ein miðvís ætlan lík hesari, sum er í uppskoti, og sum skipar byggingina av ferjunum til tørvin, sum verður ár fram, og ikki sum meira og minni tilvildarligar loysnir í neyðstøðu.

Harumframt mælir minnilutin til at breiðka uppgávuloysnina til eisini at fevna spurningin um siglingina út í Hest. Her eigur sjálvandi at finnast ein dygdargóð loysn, nú Teistin gevst at sigla um Skopunarfjørð.

Minnilutin er ikki so sannførdur um ætlanina at høvuðsumvæla Sam. Lítið er komið fram undir nevndarviðgerðini, sum sipar til skilvísi í teirri ætlanini. Tvørturímóti.

Vísandi til ómetaliga stóra tørvin á endurnýggjan av strandfaraflotanum til smærru oyggjarnar í landinum, mælir minnilutin Løgtinginum so staðiliga til at samtykkja uppskotið.

Aksel V. Johannesen hevur harumframt hesar viðmerkingar:

Tað er ikki rætt at byrja hesar íløgurnar við einari eykajáttan, og tekur undirritaði tí ikki undir við tí eykajáttanaruppskoti, sum hoyrir til hetta lógaruppskotið. Tað er alt ov leingi at bíða til 2025 at fara undir at endurnýggja strandfaraflotan, og mælt verður tí til at løguætlanin verður endurskoðað til tess, at útskifting av strandfaraflotanum kann rúmast í løguætlanini fyri 2022 og árini frameftir.

Ruth Vang hevur harumframt hesar viðmerkingar:

Tað er neyðugt at gera breiða langtíðarsemju um framtíðar útbygging av føroyska samferðslukervinum. Tað eigur ikki at vera politiskar samansetingar her og nú, sum eru avgerandi fyri raðfestingar á samferðsluøkinum.

Ferðasamband er fortreyt fyri frælsinum at búseta seg kring landið, og tí mugu samferðsluíløgur støðugt raðfestast við tí endamáli, at tú kann ferðast trygt, høgliga og regluliga, stórt sæð, hvar tú býrt.

Undirritaða tekur prinisipielt undir við uppskotinum um at endurnýggja strandfaraflotan og heldur, at uppskotið eigur at vera partur av størri raðfestari samferðsluætlan yvir longri áramál, har eisini vega- og tunnilsætlanir eru við. Í tí sambandi verður eisini neyðugt at finna semju um ein framtíðar fíggingarleist.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 7. apríl 2021

Magnus Rasmussen formaður	Aksel V. Johannesen næstformaður	Jákup Mikkelsen
Bill Justinussen	Kristin Michelsen	Páll á Reynatúgvu
	Ruth Vang	